# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- John Mccain hevur góðar møguleikar fyri at fáa eitt langt lív. Uttan iva verður hann minst 85*

*Jay Olchansky professari*

# Svørtu veljararnir reka teir hvítu yvir til Hillary Clinton

**Tann stóri stuðulin, sum Barrack Obama fær ímillum teir Svørtu veljararnar í USA, er í ferð við at reka teir hvítu veljararnar yvir til Hillary Clinton**



*Tey svørtu atkvøða fyri Barrack Obama, og tað kann fáa tey hvítu at atkvøða fyri Hillary Clinton*

*(Mynd: AP)*

Í Wisconsin, Virginia og fleiri øðrum statum fekk Barrack Obama heldur fleiri atkvøður frá teimum hvítu veljarunum enn Hillary Clinton, men á valunum í Texas og Ohio var støðan broytt. Í Ohio fekk Hillary Clinton 65 prosent av teimum hvítu atkvøðunum, og í Texas valdu 56 prosent av teimum hvítu veljarunum hana.

Ronald Walters, sum er professari á lærda háskúlanum í Maryland, heldur, at tann stóri stuðulin, sum Barrack Obama hevur fingið ímillum teir svørtu veljararnar, hevur gjørt tað lættari hjá Hillary Clinton at fáa fatur á teimum hvítu veljarunum.

Politisku eygleiðararnir í USA eru á einum máli um, at dysturin ímillum Barrack Obama og Hillary Clinton hevur fingið óvanliga nógvar svartar veljarar at greiða atkvøðu. Í summum statum er talið tvífaldað. Tað kann koma Obama til góðar í teimum svørtu býlingunum í Philadelphia, men samstundis skal hann hava undirtøku frá nógvum av teimum hvítu veljarunum í Pennsylvania, skal hann ikki tapa uppstillingina har, siga eygleiðararnir.

Uppstillingarvalið í Pennsylvania verður tann 22. apríl. Tær seinastu kanningarnar vísa, at var val har nú, hevði Hillary Clinton fingið 10 prosentstig meiri enn Barrack Obama.

# Sosialistarnir verða sitandi

**Sosialistiska stjórnin í Spania hyeldur fram aftan á valið í gjár, sum hon vann**

Tá sosialistarnir vunnu spanska tjóðartingsvalið fyri fýra árum síðani, vildi andstøðan vera við, at teir vunnu orsakað av misnøgd aftan á tær ógvusligu spreingingarnar í Madrid.

- Sponsku veljararnir hava víst, at teir lata seg ikki kúga av hóttanum frá ETA ella ræðusøgum frá andstøðuni, segði José Luis Rodriguez Zapatero, floksformaður og forsætisráðharri, tá tað var vorðið greitt, at hann og flokkur hansara høvdu vunnið valið í gjár.

Flokkurin hjá Zapatero, PSOE, fekk 169 tinglimir. Tað eru fimm fleiri enn á seinasta vali, men kortini ikki nóg mikið til at fáa meiriluta í tinginum, sum hevur 350 limir. Tann stóri borgarligi andstøðuflokkurin, PP, hevði eisini framgongd. Flokkurin fekk seks tinglimir afturat og hevur nú 154.

Sosialistarnir skulu tí hava stuðul frá minst einum flokki til at halda fram í stjórnini. Eins og í undanfarna valskeiði fer flokkurin at royna samstarv við teir smáu flokkarnar á vinstravonginum, men teir viknaðu í gjár. Eitt nú fekk tann gamli og søguríki kommunistaflokkurin bara tríggjar tinglimir. Tí noyðist Zapatero helst eisini at leita sær stuðul frá tí tjóðskaparliga flokkinum í Katalania, CiU, sum hevur 10 tinglimir.



*José Luis Rodriguez Zapatero heldur fram sum spanskur forsætisráðharri*

*(Mynd: Reuters)*

## STUTT SAGT

### Vil ikki fara frá

Forsætisráðharrin í Malaysia, Abdullah Ahmad Badawi, hevur ongar ætlanir um at leggja frá sær, hóast stjórn hansara fekk eitt vánaligt úrslit á tjóðartingsvalinum, sum var leygardagin. Stjórnin hevur framvegis ein lítlan meiriluta í tinginum aftan fyri seg, men hon fekk munandi minni undirtøku enn væntað. Andstøðan heldur, at stjórnin eigur at fara frá, tí tað vánaliga úrslitið má tulkast sum eitt misálit á stjórnina, heldur andstøðan. Andstøðan kann harafturímóti fegnast um valið, tí hon hevur nú tríggjar ferðir so nógvar tingmenn sum undan valinum leygardagin.

### Kvinna skal heiðrast

Tríggjar kvinnur í Grønlandi, Karo Thomsen Fleischer, Tukummeq Qaavigaq og Asii Chemnitz Narup, hava skotið upp at stovna ein grunn, sum skal fíggja eina bók um kvinnuna Arnarulunguaq, sum var við á teirri stóru sleðuferðini hjá Knud Rasmussen í Grønlandi. Asii Chemnitz Narup sigur við grønlendska útvarpið, at eftirtíðin hevur gloymt kvinnuna á ferðini, og at hon hevur annað uppiborið. Arnarulunguaq var borin í heim í Qaanaaq í 1896, og hon doyði 2. oktobur í 1933. Arbeiðið at savna tilfar til bókina er byrjað, sigur KNR.

### Mánin hevur ring ella ringar

Vísindafólk halda, at ein av mánunum hjá gongustjørnuni Saturn hevur ein ella fleiri ringar rundan um seg eins og gongustjørnan sjálv. Í 2004 fór rúmdarfarið Cassini fram við Saturn, og upplýsingar, sum tað sendi niður á Jørðina, benda á, at minst ein ringur er rundan um mánan Rhea. Er hetta so, er tað fyrstu ferð, at vísindin hevur funnið ein mána við ringi ella ringum.